Fyri 30 árum síðan

# Norðskálatunnilin liðugur í 1976





Fyri 30 árum síðan, tann 24. august 1976, var Norðskálatunnilin latin upp fyri almennari ferðslu við eitt hátíðarhald, sum fór fram við eystara tunnilsmunnan, har Atli Dam táverandi løgmaður, klipti snórin og knýtti harvið saman vegakervini i Eysturoy og Streymoy.

Við sínum 2.500 metrum var tunnilin tann longsti í Føroyum og tann fyrsti við dupultari koyribreyt.

Kostnaðurin fyri tunnilin við vegasambandinum var umleið 40 milliónir krónur.

Sum myndirnar sýna var nógv fólk komið saman til hátíðarhaldið, og nógvir bilar stóðu klárir at fyrsta túrin gjøgnum tunnilin. Á myndini síggjast Jógvan Arge útvarpsmaður og Atli Dam, løgmaður. Uttast til vinstru eru Dánjal Pauli Danielsen, landsstýrismaður og Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingur

*Kelda: Myndaárbókin – árið fór 1976*

---

# Nýtt vatnverk tikið í nýtslu

**Klokkan 15 í dag varð nýggja vatnverkið í Rituvík tikið í nýtslu. Í tí sambandinum varð skipað fyri samkomu, har Rodmundur Nielsen hevði orðið. Hetta var eisini seinasti arbeiðsdagur hjá Rodmundi sum borgarstjóri í Runavíkar Kommunu**

NÝTT VATNVERK
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Frá vinstru: Hermann á Líknargøtu, vatnmeistari, og Martin Olsen, fráfarin vara-vatnmeistari*

Rituvíkingar hava í nógv ár havt tørv á einum nýggjum vatnverki, tí drekkivatnið hevur verið ov skitið. Nú hava teir so fingið eitt verk, sum lýkur krøvini, og sum sambært fráfarna borgarstjóranum er gjørt til framtíðina. Stýriskipanin er gjørd soleiðis, og alt eftirlit og allar tillagingar verða gjørdar frá einum sentrali í Runavík. Málið hjá Runavíkar Kommunu er at fáa eina slíka skipan í allar bygdir í kommununi. Elduvík, Funningsfjørður, Oyndarfjørður og Æðuvík mangla enn at fáa eitt slíkt vatnverk.

**Lýkur krøvini**

Hermann á Líknargøtu er vatnmeistari í Runavíkar Kommunu. Hann er stak væl nøgdur við nýggju skipanina. Við hesum verður vatnið reinsa og strálað, áðrenn tað kemur út gjøgnum kranarnar í húskinum í Rituvík.

– Við hesum verður drekkivatnið nóg reint til krøvini. Alt vatnið, sum rennur oman til bygdina, verður reinsað her fyrst. Allar keldurnar koma ígjøgnum reinsiverki, har ið partiklarnir verða tiknir úr vatninum við sandtangunum, og síðani verður vatnið strálað, áðrenn tað rennur víðari oman í bygdina.

– Ætlanin er, at ídnaðarøkið í Rituvík eisini skal tengjast at vatnverkinum. Við hesum er linjan løgd, og vatnumstøðurnar skulu vera eins góðar í hinum bygdunum. Við hesum hava vit fingið mest framkomna vatnverk í landinum, sigur Hermann.

Dagurin í dag var samstundis síðsti arbeiðsdagur hjá Rodmundi Nielsen sum borgarstjóra og hjá Martini Olsen sum varavatnmeistari. Sostatt var løtan eisini merkt av sorgblídni, og mong nýttu høvið at takka teimum báðum fyri teirra íkast hesi seinastu árini. Runavíkar Kommuna skal nú finna ein nýggjan vara-vatnmeistara, men tað er ikki avgjørt enn, hvør tað verður.